# Yvirlivdi spreinging og livir eitt ríkt lív

**Lasse Gustavson byrjaði sum sløkkiliðsmaður. Eftir at hava verið deyðanum nær í arbeiði sínum, ferðast hann kring heimin við fyrilestri, hann kallar: Gjøgnum eldin. Tínir tankar – tínir møguleikar!**



*Hóast hann ikki sær so tespiligur út, so livir Lasse Gustavsson eitt ríkt lív*

FUNDUR
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Mikukvøldið í næstu viku fáa norðingar og onnur áhugað eitt serstakt høvi at hitta ein sløkkiliðsmann við serstakari søgu.

Talan er um svian Lasse Gustavson, sum í 1981 kom út fyri eini stórari vanlukku í arbeiði sínum sum sløkkiliðsmaður.

Hann rendi seg inn í ein stóran gassleka, sum førdi við sær eina sterka spreinging. Starvsfelagi hansara lat lív og sjálvur varð Lasse sera illa brendur.

Hesin fyrrverandi sløkkiliðsmaðurin ikki bert yvirlivdi. Hann livir í dag eitt virðismikið lív, sjálvt um hann mátti ígjøgnum ár við viðgerð fyri skaðarnar hann fekk. Hann ferðast nú kring heimin fyri at greiða frá sínum lívi.

- Og tað er hesa ótrúligu søguna, sum føroyingar nú fáa høvið til at hoyra, sigur stigtakarin, Hans Eiler Hammer, prestur í Klaksvík.

### Yvirlivdi og livir

Í 1981 fór Lasse Gustavson spentur til verka sum nýútbúgvin sløkkiliðsmaður.

Hann hevði bert arbeitt í eina viku tá sløkkibilur hansara koyrdi seg inn í ein stóran gassleka. 20 tons av propangassi sprongdust, og broyttist eftir fáum sekundum til 1000 oyðileggjandi og drepandi hitastig!

Hárið, húðin, oyruni, fingararnir. Alt brendist hjá Lassa! Men Lasse skuldi ikki doyggja henda dagin. Hann rann ígjøgnum eldin og yvirlivdi vanlukkuna!

Hesar upplivingarnar vil hann fegin greiða øðrum frá, og tí ferðast hann nú kring heimin við einum fyrilestri, hann kallar: Gjøgnum eldin – tínir tankar, tínir møguleikar!

- Hetta er ein sera rámandi og sigandi fyrilestur um at síggja seg sjálvan í spegili. Um at góðtaka tað sum er hent. Um ikki bert at yvirliva, men at liva, sigur Hans Eiler.

Í sjálvari vanlukkuni doyði starvsfelagi hansara Leif. Tí tosar Lasse nógv um munin millum at liva og at yvirliva. Hetta er tí eitt ógloymandi skeið.

Fyrilesturin hjá Lasse Gustavson hevur fingið eina sera góða móttøku bæði í Kina, Australia og India. Í Svøríki, Noregi og USA hevur hann hildi fyrilestur fyri fullsettum Mentunnarhøllum.

# Ein føroysk bingja í Tansania

**- Tað var sum at fáa eina heilsan heimanífrá, tí vit sóu eina føroyska bingju á vegnum millum Dar es Salaam og Zambia, sigur Peter O. K. Olofson, fyrrverndi prestur í Fuglafirði**

FØROYSK BINGJA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Anne-Lene Olofson við bingju við »føroyska« flagginum, sum tey møttu í Tansania. Bingjan er kortini úr Suðurafrika. Reiðaríið Safmarine er eitt gamalt suðurafrikanskt reiðarí, sum Mærsk Group keypti fyri nøkrum árum síðani*

*Mynd: Peter O. K. Olofson*

Sosialurin hevur fingið eina heilsan úr Tansania. Heilsanin er frá Anne-Lene og Petur O. K. Olofson, fyrrverandi prestahjúnini í Fuglafirði. Tey búgva nú í Mbeya, sum er ein av teimum størru býunum við tann stóra landavegin, sum gongur frá havnarbýnum Dar es Salaam til Zambia.

Á hesum vegastrekkið eru nógv parkeringspláss, har stórir bingjubilar steðga, so førararnir kunnu hvíla seg.

- Vit eru so vón við at síggja búmerkið hjá Mærsk, ta so kendu stjørnina, og tá leita tankar okkara norðureftir. Men í dag hvukku vit rættuliga við, tá Anne-Lena brádliga sá, at har var ein lastbilur við eini bingju við Merkinum á, greiðir Peter O. K. Olofson frá.

Tey máttu hyggja nærri og fáa tikið nakrar myndir.

- Hetta var sum ein heilsan norðanífrá, sigur Peter Olofson.

Tey royndu at fregnast nærri, men tá bilførarin ikki var til staðar, so funnu tey ikki útav, hvat var í bingjuni - men tey halda, at hann var á veg til Zambia.

Um onkur veit meira at siga um hetta, sigið endiliga frá!

# Heilsanin til Olofson kom úr Suðurafrika!

**Føroyska bingjan í Tansania, sum Peter O. K. Olofson sendi okkum myndir av, er ikki føroysk. Safmarine er eitt Suðurafrikanskt reiðarí, sum Mærsk keypti fyri nøkurm árum síðani**

FØROYSK BINGJA
*Eirikur Lindenskov*

Fáar minuttir eftir at greinin um »føroysku bingjuna í Tansania« kom á Portalin, fór telefonin at kima.

Fisher Johannesen úr Klaksvík greiðir okkum frá, at Safmarine er eitt gamalt suðurafrikanskt reiðarí. Hann veit ikki nevyt at siga, hvussu gamalt tað er, men kanska frá fyrra aldamótinum.

- Hatta er tað gamla búmerkið hjá teimum, og tað átøkt okkara flaggi, sigur Fisher, sum leggur afturat, at eitt nú enska bjargingarfelagið, RNLI eisini hevur føroyska flaggið sum búmerki.



*Suðurafrikanska reiðaríið hevur føroyska Merkið sum búmerki - ella rættari, kanska vit hava teirra búmerki sum merki, tí Safmarine er eldri enn okkara flagg...*

*Mynd: Peter O. K. Olofson*

# Summarleiðin vitjaði Ólav Ragnar Grímsson

**Í hesum døgum er Summarleiðin hjá útvarpinum í Íslandi. Í gjár stukku teir inn á gólvið á Bessastøðum hjá forseta Íslands, Ólavi Ragnar Grímsson**

SUMMARLEIÐIN

- Vit fingu eitt gott prát, sum vardi í hálvan annan tíma, sigur Elis Poulsen, útvarpsvertur.

Elis sigur, at forsetin var ógvuliga positivur, tá teir tosaðu um Føroyar.

- Vit spurdu hann, um hann hevði hug at vitja aftur í Føroyum, og tá svaraði hann ógvuliga avgjørdur, at Føroyar var eitt av teimum londunum, sum liggja honum nærmast at hjartanum at koma at vitja.

- Og hvør veit, um ikki vit hoyra ein fittan part av samrøðuni við íslendska forsetan í útvarpinum seinni í vetur, spyr Elis Poulsen.

Elis Poulsen hevur búð nógv í Íslandi. Í 1964 flutti hann til Íslands saman við foreldrunum, og var har til 1971. Seinni fór hann yviraftur at læra til úrtagarðsmann, so Elis er væl kunnugur við íslendska málið og viðurskifti annars. Elis greiðir eisini Sosialinum frá, at Útvarp Føroya var fyrsti útlendski fjølmiðlin, ið hitti Ólav Ragnar Grímsson eftir at hann varð valdur fyrstu ferð - júst tí Elis hevði so gott samband við fólkini kring forsetan.

Tað er systir Elis, Marentza Poulsen, sum hevur verið bilførari og hjálpt útvarpsmanningini annars í Íslandi.



*Útvarpsmanningin á Summarleiðini, Øssur Egholm, Finnur Hansen, Marentza Poulsen, systir Elis, Ólavur Ragnar Grímsson, Elis Poulsen og Kári Sólstein*